UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **12. februar 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-42**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 51/2019 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52a. Fyrispurningur um nýggjan húsarhaldsskúla, settur landsstýrismanninum í undirvísingarmálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu langt er komið við ætlanunum at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík?
2. Nær verður húsarhaldsskúlin liðugur?
3. Hvussu nógvum næmingum hevur nýggi skúlin pláss fyri?
4. Hvat væntast næmingagjaldið at verða?
5. Hvat hevur prosjektið kostað higartil?

Svar

Sum tað fyrsta vil landsstýrismaðurin vísa á, at talan er ikki um eina almenna verkætlan at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík, men um eina verkætlan hjá sjálvsognarstovninum Húsarhaldsskúli Føroya, sum landsstýrismaðurin, við heimild í løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019, kann stuðla við í mesta lagi 21 mió. kr. úr landskassanum. Stuðulin verður veittur sum eitt rentufrítt og avdráttarfrítt lán.

Til 1: Sambært Húsarhaldsskúlanum er verkætlanin komin somikið langt, at næsta stig er at fara undir prosjektering av bygninginum. Prosjektering og útbjóðing væntast at verða klárt í oktober 2020. Skúlin hevur í hesum sambandi víst á, at tørvur er á stuðli til henda partin av verkætlanini.

Eftir at bæði Klaksvíkar kommuna og Bústaðir, sum skal rinda kostnaðin fyri vistarpartin av skúlanum, hava givið tilsøgn um stuðul til teirra part av prosjekteringskostnaðinum, hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið eftirfylgjandi givið skúlanum tilsøgn um stuðul til okkara part av prosjekteringini.

Til 2: Sambært nýggjastu tíðarætlanini hjá Húsarhaldsskúlanum væntast skúlin at verða liðugur á sumri í 2023.

Til 3: Sambært fyriliggjandi skipanaruppskoti um nýggjan húsarhaldsskúla skal skúlin hava pláss fyri 35 næmingum, ið kunnu ganga og búgva í skúlanum.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Til 4: Í viðmerkingunum til løgtingslógina um studningslán til at byggja húsarhaldsskúlan stendur, at næmingagjaldið sambært fyriliggjandi figgjarætlan yvir raksturin av nýggja skúlanum verður áleið kr. 3.200 um mánaðin. Tað er tó trupult at siga, um hetta verður endaliga næmingagjaldið fyri húsarhaldsskeiðið, tí enn eru tað nøkur viðurskifti, sum kunnu ávirka næmingagjaldið, ið skúlin ikki kennir neyvt.

Kostnaðurin fyri húsarhaldsskeiðið er í dag kr. 2.200 um mánaðin umframt tilmeldingarkostnað og undirvísingartilfar. Fyri onnur styttri skeiðir, sum skúlin eisini fyriskipar, er kostnaðurin ymiskur.

Til 5: Sambært Húsarhaldsskúlanum hevur prosjektið higartil kostað 800 tús. kr.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ummr@ummr.fo • www.ummr.fo